# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Knortlut politisk grundgeving

At politikarar nýta margháttligar grundgevingar viðhvørt, hava vit so mangan erfarið. Men grundgevingin, sum Aksel V. Johannesen nýtti í útvarpinum leygardagin, um at nýggi sjúkrakassastovnurin, Heilsutrygd, skal leggjast í Klaksvík, tí har eru kompetent starvsfólk, tí har er eitt sjúkrahús, og tí har er eitt apotek, tykist fullkomiliga absurd.

Landsstýrismaðurin hevur fyrr kunngjørt, at nýggi stovnurin skal leggjast í heimbýin hjá honum, Klaksvík. Tað er so tað. Hesum kunnu vit so vera samd í ella ikki. Men grundgevingarnar, sum landsstýrismaðurin nú hevur, vísa best, at politiski viljin er, at stovnurin undir ongum umstøðum skal liggja í Havn. Javnaðartingmenn hava fyrr trætst um, hvørt stovnurin skal liggja í Sandoynni ella í Klaksvík.

Í Havn hevur Sjúkrakassin ein stóran bygning við fleiri starvsfólkum. Í Havn er Landssjúkrahúsið og í Havn er Tjaldurs Apotek og Landsapotekarin. Út frá grundgevingunum hjá landsstýrismanninum, so er besta plaseringin, at leggja Heilsutrygd í Havn – annars er eingin logikkur uttan tað, at stovnurin undir ongum umstøðum skal liggja í Havn.

Tað er eftir øllum at døma ein tvørpolitisk semja í landsstýri og á tingi um, at fleiri almennir stovnar skulu dragast úr Havnini og út á bygd, og tá talan er um ein nýggjan stovn, so kemur tað slett ikki upp á tal, at hann skal liggja í Havn. Tað verður ikki eingong spurt, um nú høgligast var at leggja stovnin í Havn ella ikki. Politiska hugsanin er tann, at tað eru so nógvir almennir stovnar í Havn frammanundan – og Havnin fær nokk av almennum krónum upp á tann mátan.

Tað tykist ikki sørt sum ein primitivur framferðarháttur – har endamálið tykist vera, at tað skal vera líka keðiligt í Havn, sum til dømis í Klaksvík ella onkra aðrastaðni.

Tað kann gott vera, at tað er skilagott, at Heilsutrygd ella onkur annar stovnur verður lagdur í Klaksvík. Men so eigur landsstýrismaðurin at verða maður fyri at grundgeva reiðiliga fyri síni støðutakan. Tað, sum Aksel V. Johannesen borðreiddi við leygardagin var beinleiðis banalt.

Samgongan var ikki før fyri at gera bygnaðarligar broytingar í fíggjarlógini, har veruligar sparingar kundu gerast á fíggjarlógini. Tí brúkti Eidesgaard primitiva plenuklipparan, sum hevur vanlukkuligar avleiðingar á fleiri økjum. Hevði tað verið teirra egni privati búskapur, so høvdu teir uttan iva vitað, hvørjar útreiðslur kundi verið spardar burtur. Tað tað megna hvørki landsstýri ella løgting at gera við fíggjarlógini, sum í nógvum førum hevur eina ørgrynnu av dupultfunktiónum, sum kosta skattgjaldarunum hundraðtals milliónir krónur.

Sum sagt omanfyri, so er tað uttan iva rætt, at summir stovnar verða lagdir kring landið. Men tá má vera ein ordiliga ætlan aftanfyri, so ikki tilvildarligir landsstýrismenn dragar tilvildarligar stovnar til sína heimbygd, bara tí at stovnarnir ikki skulu liggja í Havn. Tað kann ikki verða eitt endamál í sær sjálvum.

Okkara kosnu menn og kvinnur eiga eisini at hugsa um, at Havnin er okkara høvuðsstaður, sum skal vera tann býurin, sum skapar dynamikk og synergieffekt kring landið. Við politikkum um, at alt skal spjaðast kring landið, so kann hetta oyðileggjast, og tá verða bæði Havnin og bygdirnar taparin. Vælsignaði fólk gerið ikki slíkt í berum populistiskum ovfarakæti.

**Sosialurin**

## Frítíðarskúlin í Havn á breddanum



**JÓGVAN ARGE**
dormaður
mentamálanevnd
Tórshavnar Býráðs

Tórshavnar býráð ger ikki sørt burtur úr at fáa frítíðarskúlarnar í kommununi fram á leið. Á seinasta býráðsfundi fyri jól vóru fleiri mál av hesum slag til viðgerðar.

Eitt mál snúði seg um at kanna møguleikarnar og gera projekt fyri at byggja upp í sonevnda Gula skúla í Vesturbýnum. Har er hugsanin at byggja fýra stovur í tveimum hæddum til fyrst og fremst at hýsa frítíðarskúlanum, men eisini til nýtslu hjá Venjingarskúlanum, um tað ber til..

Frítíðarskúlin í Vesturbýnum hevur eina heldur baldruta tilveru. Hann heldur til í einum húsum við Havstovuna, í hølum á Føroya Fólkaháskúla og hølum í Havnardali. Háskúlin kann ikki longur hýsa frítíðarskúlabørnum frá næsta skúlaári, og spurningurin er, hvussu verður við hølunum í Havnardali í longdini.

Besta loysnin er at fáa savnað allan frítíðarskúlan á einum stað, og tað er hetta, sum býráðið hevur samtykt at seta pengar av at kanna og evt. projektera við Gula skúla við Landavegin, sum er ein partur av Venjingarskúlanum.

Frítíðarskúlin hjá Sankta Frans skúla húsast her og har. Nú er samtykt at fara undir at projektera ein lítlan smábarnaskúla norðanfyri Nunnuskúlan. Hesin skúlin skal hýsa teimum yngstu børnunum í forskúlanum, yngstu fólkaskúlabørnunum og frítíðarskúlanum.

Ætlanin hevur leingi ligið á borðinum, men nú eru seinastu forðingarnar fyri byggingini fingnar av vegnum, og farið verður óivað undir byggingina í 2010.

Frítíðarskúlin húsast eisini í Badmintonhøllini, sum kommunan eigur. Hon verður fyrst og fremst nýtt av Havnar Badmintonfelag, men frítíðarskúlin er eisini har.Har eru umvælingar neyðugar til tess at báðir nýtararnir kunna fáa hóskiligar umstøður. Tað fyrsta verður at skifta takið á høllini. Samtykt er at taka av einum tilboð á 1,7 mió krónur til endamálið. Hetta var bíligari enn mett.

Teir nýggju stóru skúlarnir, sum verða bygdir í Hoyvík og á Argjum fara at hýsa frítíðarskúlabørnum úr sínum økjum. Frítíðarskúli hevur longu leingi verið á skúlanum við Løgmannabreyt, og um smá tvey ár fer Skúlin á Argjahamri at hýsa øllum frítíðarskúlabørnum á Argjum og har á leiðini.

Argjabørn ganga í dag í frítíðarskúla í ymsum hølum, eitt nú í Løkjatúni og í pavilliongum við posthúsbygningin..

Frítíðarskúlin hevur havt tað eitt sindur gjálvut, síðani skúlabørnini í teimum smæstu flokkunum hava fingið fleiri tímar í fólkaskúlanum. Hetta minkar um tímarnar, tey eru í frítíðarskúla.

Tað hevur aftur við sær, at játtanirnar til frítíðarskúlarnar minka, tí brúk er ikki fyri so nógvari arbeiðsmegi, tá tímarnir eru vorðnir færri. Havnar Kommuna arbeiðir í løtuni við loysnum, sum evt. fevna um nýggj tilboð á frítíðar- og ungdómsøkinum sum heild.

## Hvør stingur hvønn?



**FRÍÐRIK SIVERTSEN**
nevndarlimur í Føroya
Fiskimannafelag

Eftir at vera ákærdur fyri at stinga okkara formann í ryggin, er ein noyddur at gera eina viðmerking til málið.

Tað er nevniliga so, at heldur enn at hava verið illoyalur, havi eg verið alt ov loyalur. Eg eri ongantíð farin út úr felagnum við nøkrum trúnaðarupplýsingum. Harafurímóti havi eg roynt at skavað útyvir fleiri av mistøkunum hjá formanninum, fyri at hann ikki skuldi koma í ringt ljós.

Hetta skal skiljast á tann hátt, at okkara formaður ferð eftir ferð er sloppin at koma fram við ósannindum, ið als onki hava við veruleikan at gera, uttan at eg hava vilja gjørt vart við tað. Tað seinasta hann nú førir fram er at útlensk arbeiðsmegi var størsti knúturin í seinastu samráðingunum. Hetta er beinleiðis ósatt. Reiðarafelagið hevði nevniliga onki mótkrav. Og eftirsum tað er so, at um tú sleppur at endurtaka eini ósannindi nóg ofta, ja trygva fólk flest at tað er satt. Tó skal sigast, at undir næstsíðstu samráðinum var tað ein lyklaspurningur.

Mín meting er, at samstarvið í nevndini í Fiskimannafelagnum er sum í flestu feløgum. Hetta, hóast formaðurin gongur umborð í skip og sigur seg ikki fáa arbeitt, tí nevndin er í tvíningum. Hetta kenni eg so onki til. Vit eru næstan altíð allir samdir, tó er tað í einstøkum førum, men sjálvdan, at tað ikki er so. Hetta er onki ónormalt, men er heldur tekin um at demokratiið valdar.

Tá formaðurin ger slíkt kundi ein kanska spurt, hvør tað er ið stingur hvønn í ryggin, formaðurin ella eg.

Afturat tí skal sigast, at tá lagt verður eftir ávísum parti av nevndini fyri at leka upplýsingar til miðlar og reiðarafelagið, so má eg harliga afturvísa hesum uppástandi. Hetta er ein loddrøtt lygn. Heldur vil eg vísa á, at tað sum fram er komið í fjølmiðlunum, um tær tvær ella tríggjar ósemjururnar, ið verið hava seinastu trý árini, er sett fram av formanninum sjálvum og einum øðrum av nevndarlimunum.

Tað er ongin loyna, at okkara formaður hevur ein diktatoriskan leiðarahátt, og ein við slíkum tonkum tolir heldur ikki, at nakar hevur eina aðra meining. Tað kemur týðuliga fram við jøvnum millumbili, bæði á skrift og í talu, og fólk sum hava fylgt eitt lítið sindur við í miðlum og kjaki annars, vita at so er.

Tá vit nú eru komin hartil, at formannsval er á skránni, so eri eg fegin um, at onkur er sum bjóðar núverandi formanni av. Eftir mínum tykki er kapping sunn, og eg haldi, at tað er so lítið sum er komið burturúr hesi seinastu trý árini, at tað neyvan kann verða verri, líkamikið hvør annar situr í formannssessinum.

Gott nýttár øll somul.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.